**Fríggjadag 10. kl. 20.50**



### Robin Hood: Hetjur í undirbuksum

Vit kenna helst øll klassiska ævintýrið um Robin Hood, men her verður hetjan úr Nottingham skógunum ílatin nýggjan ham. Sum ikki einaferð er tað Mel Brooks, sum hevur snarað leikbókini, soleiðis at talan verður um eina ørgrynnu av meira ella minni svakligum hendingum, men kjarnin í søguni er tó kortini hin sami.

**Fríggjadag 10. kl. 22.20**



### Basin

Á Fort Tilman er general Becker innblandaður í eitt mál um narko- og vápnasmugling. Herurin hevur tó eingi prógv fyri hesum, og fyri at fáa tey til vega, verður John Murphy sendir til fortið. Alt fyri eitt kemur Murphy upp á kant við nakrar av sterku monnunum á hernaðarbasanum, men so við og við vinnur hann tó virðing teirra.

**Fríggjadag 10. kl. 20.45**



### Stjørna í eitt kvøld 2:13

Onnur sending um tey, sum royna seg sum stjørnur í sjónvarpinum. Tvøroyargentan Guðrun Jacobsen er millum tey 50, sum skulu kappast um stjørnuheitið. Í kvøld eru millum onnur ein serlærari, tvey sum dansa, ein portørur, ein tolkur og eitt pedagoghjálparfólk at síggja á pallinum. Hyggjarar her heima kunnu fáa onkran í Danmark er ringja ella at senda sms fyri seg, um teir vilja vera við til at geva av, hvør skal verða stjørna. Tað ber ikki til at ringja úr Føroyum til tað nummarið, sum donsku hyggjarnarnir skulu ringja til.

**Fríggjadag 10. kl. 20.25**



### Okkara kokkar 12

Vitjað verður á vestlaks í Kollafirði, síðani fara vit í studio, har gjørdir verða ymiskir laksarættir: Oksabótasuppa við grønmeti og laksaterningum. Innbakaður laksur við hvítleyksosti, jákupsskeljum og rækjum og sós afturvið. Stokt fylt laksafløk við rækjum, kryddurtum, leyki og soppum, afturvið er hvítvínssós og grønmetisblanding.

**Leygardag 11. kl. 19.00**



### My Girl

Dan Akroyd og Jamie Lee Curtis hava høvuðsleiklutirnar í filminum um 13 ára gomlu Vadu, hvørs tilvera enn eina ferð er um at broytast. Stjúkmamma hennara, Shelly, er upp á vegin, og tey flestu frøast um hetta. Vada hugsar hinvegin nógv um deyðu mammu sína, og hon ger av at fara til L.A. fyri at finna út av, hvør og hvussu mamman í veruleikanum var.

**Leygardag 11. kl. 19.40**



### Mús í egnum húsi

Ernie og Lars arva eini gomul hús, og tá teir finna útav, at ein víðagitin arkitektur hevur teknað húsini, gera teir av at seta tey í stand. Ætlanin er so, at teir skulu vinna hópin av peningi við eini sølu, eftir at húsini eru liðug. Tað er tó ein trupulleiki. Ein mús býr longu nú í húsunum, og hon hevur so ongar ætlanir um at flyta út.

**Leygardag 11. kl. 20.00**



### SATSA

Luttakarar í 20. sending: Danny Kruse, Tórshavn, Edvard Joensen, Sandavágur og Høgni Olsen, Tórshavn

**Leygardag 11. kl. 20.35**



### Superman

– bretskur filmur frá 1978 við Christopher Reeve.
Tá ið Jor-El, vísindamaður sær, at gongustjørnan Krypton er um at spreingjast, sendir hann sonin út í rúmdina við kós móti jørðini, har hann skal verða Clark Kent – ein friðarligur tíðindamaður í Metropolis, sum skjótt verður kendur sum Superman. Kanska einasti maður á jørðini, ið kann steðga brotsmanninum Lex Luthors.

**Sunnudag 12. kl. 9.30**



### Kettubrøvini

13 ára gamla Sofi býr úti á landinum saman við mammuni og nýggja sjeiki hennara. Hon hittir eina klóka kvinnu, sum sigur frá óhugnaligum søgum um óloystar gátur úr fortíðini. Samstundis finnur Sofi kettuna Mitzi, sum eisini fær okkurt bræv við postinum.

**Sunnudag 12. kl. 19.00**



### Katarina hin stóra

Hon var mætasta kvinna í heiminum, og bæði lív og leiðsla hennara var í mangar mátar óvanlig. Katarina syrgdi fyri, at maður hennara varð myrdur, soleiðis at hon slapp fram at trúnuni, og 34 ár var tað hon, sum stýrdi Russlandi. Hetta vórðu 34 ár, sum fyri altíð fara at merkja russisku søguna.

**Sunnudag 12. kl. 15.25**



### Ull og spuni 2:3

Søgulig frágreiðing um føroyska siðvenju innan seyð, ull og spuna.
Hetta er ein sendirøð í trimum pørtum, sum Føroya Heimavirkisfelag hevur framleitt. Greitt verður frá, hvussu ullin varð handfarin, frá tí at seyðurin verður kliptur til ullin er spunnin til tógv og nýtt til binding, veving og annað. Nikolina Beder greiðir frá og vísir í verki, hvussu arbeitt verður.  Millum frágreiðingarnar eru myndatøkur av seyði í haganum, sum Zacharias Hammer hevur gjørt. Í øðrum parti síggja vit, hvussu ullin verður karðað og spunnin til tógv.

**Sunnudag 12. kl. 19.30**

### Nýggjárskonsert úr Norðurlandahúsi-num 2003 - beinleið-is

Sunnudagin 12.januar kl 19:30 verður nýggjárskonsertin hjá Føroya Symfoniorkestri í Norðurlandahúsi-num send beinleiðis í Sjónvarpi- og Útvarpi Føroya.
Á skránni er tónleikur eftir Strauss, Lumbye, Lehar, Offenbach, Bizet, Tschaikovsky, Verdi og Wagner. Solistar á fiól eru Tobias Durholm og Mikkel Futtrup. Teir starvast báðir sum konsertmeistarar í symfonior-kestrinum í kongaliga leikhúsinum í Keypmannahavn. Felagssangur verður sum vanligt og blandað kór luttekur eisini. Tveir dirigentar verða hesaferð. Íslendingurin Gardar Cortés leiðir kórtónleikin og Martin Mouritsen leiðir ljóðføristónleikin.

**Mánadag 13. kl. 19.00**



### Rat Pack

Saman við Peter Lawford, Joey Bishop, Sammy Davis Jr. og Dean Martin hevði Frank Sinatra fimm gylt ár fyrst í seksti-árunum við the Rat Pack. Teir fimm undirhaldararnir vóru snøgt sagt einastandandi, og í fimm ár vóru teir at kalla einaráðandi, tá tosast skuldi um amerikanskt show-biz.

**Mánadag 13. kl. 20.45**



### 24 tímar – amerkonsk spenningsrøð.

Jack Bauer stríðist enn við at verja valevnið móti álopsmonnum. Heldur ikki familjan er í so tryggum hondum, sum hann heldur. Nú eru fáir tímar eftir av longsta samdøgrinum í lívinum hjá Jack.

**Mánadag 13. kl. 19.00**

### Skúlagáttin

LÆRARAFELAGIÐ OG SKÚLIN
Gestur innan Skúlagátt er Elsa Bir-gitta Pálsdóttir Petersen, formaður í Føroya Lærarafelag. Fregnast verður um korini hjá lærarum í dag, og hvørjar hugsanir formaður felagsins hevur um Hin Góða Fólkaskúlan, samstarv við kommunurnar, um læraraútbúgvingina og um komandi aðalfund Føroya Lærarafelags. Fel-agið, sum varð stovnað í 1898 og er eitt av elstu fakfeløgum í landinum, telur í dag 900 limir. Í sendingini hoyra vit eisini Paula Nielsen rektara á Føroya Læraraskúla, Gyðju Hjalm-arsdóttir lærara og Beintu Haraldsen studentaskúlanæming.
Birgir Kruse leggur sendingina til rættis.

**Mánadag 13. kl. 11.55**



### Strandar-detektivarnir

Mick og Joey serlja High Tide og fara til Santa Barbara fyri at hjálpa til við einum máli um sonin hjá einum ríkmanni. Hesin er eftirlýstur fyri morð, og tað krevur sjálvandi sín mann at greiða fløkjuna.

**Týsdag 14. kl. 18.55**



### Giorgio Armani

Seinastu tvey tíggjuáraskeiðini í farnu øld gjørdist Giorgi Armani til eina legendu innan alheims mótasnið. Armani byrjaði virki sítt fyri 25 árum síðani, og í dag flokkas alheims stjørnur til hansara, soleiðis at tey kunnu verða ílatin júst røttu klæðini. Vanliga hevur hann verið lítið fyri at tosa við miðlarnar, men her er so ein dokumentarsending um hann, sum belgiski Julian Ozanne hevur gjørt.

**Týsdag 14. kl. 20.00**



### Stepmom

Filmurin tekur støði í eini trætu, sum nógv helst kenna aftur. Luke er júst fráskildur konu sínari, Jackie, og er nú í ferð við at byggja sær eina nýggja tilveru saman við Isabel. Hvørki Jackie ella børnini tykjast dáma Isabel nakað serligt, og hon er tí noydd at stríðast, til tess at vinna teirra virðing og kærleika.

**Týsdag 14. kl. 19.25**



### Bókatátturin

Brúkarasending um bøkur og rithøvundar.
Sum oftast er ein samrøða við ein aktuellan rithøvund, og víst verður til bøkur sum eru frammi, bæði í Danmark og í grannalondunum.
Runt sjónarringin
Donsk sending um aktuel viðurskifti sum oftast úti í heimi.

**Týsdag 14. kl. 16.00**



### Fólk á Rásini

Rúna Sivertsen tosar við Adelborg Linklett.

**Mikudag 15. kl. 7.30**



### Stjørnumakarin

Á Sicilia í 50'unum ferðast Joe Morelli runt í vøruvogni og sigur seg vera skóta fyri eitt stórt filmsfelag. Hóast hetta ikki er satt, koma fólk til royndarfilmingar hjá honum fyri 1.500 lirar, men stóri áhugin fyri hesum fær óvæntaðar fylgjur fyri Joe.

**Mikudag 15. kl. 14.45**



### Jenny Jones

Hesa ferð er evni hjá Jenny tineygjarar og, hvussu torført tað kann vera at halda skil á hesum. Tosað verður millum annað við foreldur, sum fullkomuliga hava mist tamarhaldið á børnum sínum.

**Mikudag 15. kl. 19.30**

### Fólk og frítíð

Beint undan jólum komu tær fýra, Kristin Stampe, Sigrid á Høvdanum, Malan Isaksen og Hjørdis Sigurdsdóttir Isaksen, heim aftur, eftir at hava verið á klænkiskeiði á Ebeltoft Kurcenter. Í sendingini skifta vit orð við tær um hví tær júst valdu Ebeltoft Kurcenter, um mat- og gerandisvanar áðrenn og aftaná, og í hvønn mun broytti lívsstílurin ávirkar familjuna. Eisini fer Sigrid á Høvdanum at borðreiða við einum bita, sum hóast vælsmakkandi, letur teg sita eftir við góðari samvitsku.
Gunnar Nolsøe leggur til rættis.

**Mikudag 15. kl. 19.50**



### Hondbóltur: Føroyar – Belgia (menn)

Beinleiðis hondbóltiur í SVF. Vit senda undandystin millum Føroyar og Belgia í kappingini um Evropmeistaraheitið í hondbólti fyri menn.

**Hósdag 16. kl. 9.00**



### Syndarar í summarsól

Fýra menn og fýra kvinnur búgva í einum húsum við Skergarðin. Tey njóta summarið, arbeiða við ymsum ætlanum og droyma um eina tíð víð opinleika, vinarlagi og kærleika. Men so kemur tann frísinnaði Evelyn úr París.

**Hósdag 16. kl. 19.35**



### Narkobørn

Børnini, sum verða løgd inn á Cedars Sinäi í Los Angeles eru øll børn, sum hava ein felags trupulleika. Tey eru børn hjá narkomanum, og tískil bundin at hørðum evnum longu áðrenn tey eru fødd. Somuleiðis hoyra vit Agosto Sola greiða frá um vaksandi trupulleikan í USA við sonevndu narkobørnunum.

**Hósdag 16. kl. 19.20**



### Rain Man

Tá pápin doyr, Charlie finnur útav, at hann ikki er einsamallur um arvin. Og hann gerst ikki minni bilsin, tá tað vísur seg, at beiggi hansara er autistiskur. Saman koma teir báðir tó at kenna hvønn annan.

**Hósdag 16. kl. 19.25**



### Altíð í myrkri – um familjuharðskap

Hildið verður, at umleið 100.000 kvinnur í Norra liva í paraløgum, har harðskapur og hóttanir eru gerandiskostur, eins og hildið verður at 1000 kvinnur í heilum noyðast at rýma undan fyrrverandi sambúgva. Løgreglan verður løgd undir ikki at taka harðskap millum hjún í álvara. Sendingin er norsk.

**Leygardagur 14. kl. 19.05**

### Á Vaglinum

Á Vaglinum er spurnarkapping millum løgtingslimir og í ársins fyrstu kapping hittast Jógvan Arge og Jóannes Eidesgaard, ið skulu dystast ímóti Heðini Mortensen og Jenisi av Rana.
Kappingin er skipað við eitt nú spurningum úr føroyskari náttúru, skipasøgu, byggilist og tónleiki. Harumframt eru aðrar kappingar, so sum Røðan og Avbjóðingin, har veljast kann millum Svervektarin og Musikalsku avbjóðingina.
Gunnar Nolsøe leggur til rættis.

**Sunnudagur 15. kl. 14.15**

### Fram við ánni

Vitjað veðrur í Hovi og farið verður ein túr niðan á Vatnsnes, har Ditlev Hammer sigur frá søgum og sagnum í Hovi. Prátað verður eisini um umhvørvið framvið Hovsá. Jónheðin Tróindheim leggur til rættis.

**Hósdag 16. kl. 19.00**

### Tilvera: Men størstur av teimum er kærleikin

Ester og Ólavur høvdu verið trúlovað í 6 ár, tá tey gjørdu av at giftast. Tey siga frá, tá kærleikin byrjaði at spíra teirra millum til nú tey hava verið gift í eina tíð.

## Ítróttur

Leygardagin kl. 14.00
Tipslørdag

CANAL+

Leygardagin kl. 14.55
Premier League: WBA-Man. United

Sunnudagin kl. 12.55
Premier League: Tottenham-Everton

Sunnudagin kl. 14.55
Premier-League: Birmingham-Arsenal

CANAL+

Leygardagin kl. 19.25
Serie A: Brescia-Lazio

Sunnudagin kl. 19.25
Serie A: Inter-Modena

Mikudagin kl. 1.30
NHL: Carolina-Colorado

### Canal+ zap

Leygardagin kl. 14.55
Premier League: Liverpool-Aston Villa

Fríggjadagin kl. 20.40
EC Hondbóltur: Slagelse-GOG, kvinnur

Sunnudagin kl. 13.30
CL Hondbóltur: Viborg HK-Nordstrand, kvinnur

Sunnudagin kl. 15.15
Hondbóltur: Danmark-Póland, menn

Mánadagin kl. 10.00
V5 travet

Mikudagin kl. 21.00
Hondbóltur: Slagelse-Randers, kvinnur

### Beinleiðis á Eurosport hesa vikuna

Rally: Dakar 2003
Tennis: WTA úr Sydney, Australia
Tennis: ATP úr Sydney, Australia
Tennis: Australian Open
Skíðskjóting úr Oberhof, Týsklandi
Supercross úr Anaheim, USA
Langrenn úr Otepää, Estlandi
WC Nordic Combined úr Chaux-Neuve, Frankrig
WC Nordic Comined úr Schonach, Týsklandi
WC Alpint úr Chamonix, Fraklandi
WC Skíðlop úr Liberec, Kekkia
WC Skíðlop úr Bischofshofen, Týsklandi
Hondbóltur: Frakland-Týskland, menn
Fótbóltur: Werder Bremen-Fenerbahce
Fótbóltur: Hertha Berlin-Spartak Moskva

TV2 ZULU

Sunnudagin kl. 12.55
Íshockey: Rødovre-Herning

Sunnudagin kl. 15.10
NFL: Gameday

Sunnudagin kl. 18.05
Hondbóltur: Larvik-Ikast/Bording, kvinnur

Sunnudagin kl. 20.40
NFL: Beinleiðis

Sunnudagin kl. 20.25
NBA: L.A. Clippers-Dallas

**VARPIÐ**

Eykablað í Sosialinum
hvønn fríggjadag

Postsmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 311820
Fax: 314720
e-mail: varp@sosialurin.fo

Útgáva: Sosialurin
Layout: Team 85
Umbróting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin